Kommunufelagið

VINNUMÁLARÁÐIÐ
TINGANES
POSTBOX 377
110 TÓRSHAVN

Dagfesting
29. januar 2015

Okkara j.nr.
15/00394-2

Málsviðgeri
Eyðun Christiansen

Tygara j.nr.

**Viðv. Uppskot til løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um havnaloðsing**

Vinnumálaráðið hevur 13. januar 2015 sent Kommunufelagnum uppskot til løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um havnaloðsing, til hoyringar. Hoyringsfreistin er 29 januar 2015.

Endamálið við uppskotinum er, at frítaka smærri føroysk farmaskip og útlendsk fiskiskip við føroyskum skiparum umborð, fyri loðsskyldu.

Kommunufelagið hevur ikki viðmerkingar til hesi ítøkiligu undantøk, sum helst eru rímilig.

Hinvegin kann Kommunufelagið bara staðfesta, at hesi undantøk standa í andsøgn við tey krøv, sum vóru sett loðsum í “uppskot til kunngerð um loðsprógv og loðsfrítøkuskjal v.m.”, sum var sent Kommunufelagnum til hoyringar í november 2012. Í kunngerðini vóru krøvini til loðsar í føroyskum havnum so mikið strong, at vandi var fyri at einki skip vildi leggja at í føroyskari havn.

Hóast slaka var í krøvunum til loðsar í endaligu kunngerðini, kann staðfestast, at krøvini um eftirútbúgvingar av persónum, sum kanska í áratíggjur høvdu siglt út og inn av sama firði, hava kosta kommununum væl av peningi. Men nú viðmerkingar koma frá vinnuni, tykist Vinnumálaráðið at hava lættari við at gera broytingar og slaka krøvini.

Møguliga ber hendan broytingin boð um, at Vinnumálaráðið er í gongd við, at laga lóggávuna til føroyska veruleikan.

Kommunufelagið hevur ikki aðrar viðmerkingar.

Vegna

Kommunufelagið

| | |
|---|---|
| Heðin Mortensen | Eyðun Christiansen |
| Formaður | Stjóri |